## Noreg og Ísland gjørt oljuavtalu

Tá norski uttanríkisráðharrin, Jonas Gahr Støre, var í Reykjavík í gjár, skrivaðu hann og Geir H. Haarde, forsætisráðharri, undir eina avtalu um, hvussu olju- og gasstilfeingið undir havbotninum millum íslendska markið og markið kring Jan Mayen skal umsitast. Íslendska stjórnin fyrireikar seg til at bjóða oljufeløgum at leita eftir olju og gassi á einari leið millum Ísland og Jan Mayen. Sambært einum sáttmála frá 1991 hevur Noreg rætt til 25 prosent av virkseminum, um Ísland ger av at fara undir olju- og gassvirksemi á einum ávísum parti av íslendska landgrunninum, skrivar Aftenposten.



# ES-borgarar við ongum rættindum í Føroyum




**Alt sá so gott og lovandi út, tá vit 1. juli í ár fingu eina broytta og á pappírinum meira liberala útlendingalóg. Tíðin, síðan lógin kom í gildi, hevur víst, at tað er lætt at fáa fólk higar at arbeiða og sigla. Hinvegin tekur tað langa tíð hjá teimum at fáa tey rættindi, sum borgarar í Føroyum annars hava – við adressu, lækna, røttum skatti og luti í føroyskum skipanum annars. Men felags fyri útlendingarnar er, at tey taka lut í øllum gjøldum, sum samfelagið áleggur teimum – heilt frá fyrsta arbeiðsdegi**

ÚTLENDINGAR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í Sosialinum 30. oktober høvdu vit grein um útlendskar fiskimenn, sum sigla við føroyskum skipum. Talan var um menn, sum hava ógvuliga trupult við at fáa síni viðurskifti í Føroyum í rættlag, soleiðis at teir kunnu liva sum aðrir borgarar í Føroyum – ikki bert við skyldum – men eisini við somu rættindum, sum føroyingar annars, meðan teir virka her.

Í greinini varð víst á, at hesir menn eftir broyttu útlendingalógini, sum kom í gildi 1. juli í ár, hava havt trupulleikar við p-talinum, sum øll tann føroyska skipanin byggir á og soleiðis eisini við minstuløn, sjómanskatti og viðurskiftunum við peningastovnar.

Av órøttum komu vit í ein ávísan mun at reisa iva um virksemið hjá Sp/f Crew, sum hevur tikið fleiri av hesum monnum heim til Føroya at sigla og arbeiða.

Er tað nakað einstakt felag ella arbeiðsgevari, sum kennur viðurskiftini hjá útlendsku arbeiðsmegini í Føroyum út í æsir, er tað eitt felag sum Crew, sum hvønn dag arbeiðir við slíkum málum og loysnum.

Trupulleikarnir snúgva so sanniliga ikki bara um útlendskar fiskimenn við føroyskum skipum, men so sanniliga eisini um onnur arbeiðsfólk, ið komin eru úr ES-londum til Føroya at arbeiða, liva og virka.

### Tiga ella tala

Sosialurin hevur vitjað Crew, sum húsast á Sandvíkarhjalla og hevur fingið felagið at lýst okkum og almenninginum teir trupulleikar, ið felagið sum arbeiðsgevari og tey arbeiðsfólk, tey hava tikið til landið, í veruleikanum hava at dragast við.

Á skrivstovuni hittu vit Carl Kristiansen, marknaðarleiðara og Jónas Sigmarsson, stjóra.

- Tú veit ongantíð, nær ella um rætt er at fara út alment við viðurskiftum sum hesum, tí tú vilt ikki gera støðuna verri, enn hon er – hvørki hjá teimum, sum komin eru higar, ei heldur hjá okkum sjálvum, sum hava so nógv samskifti og samstarv við myndugleikar og stovnar.

Men teir halda kortini, at nú hol er sett á hesi viðurskifti, er umráðandi, at tað, sum kemur á prent, er rætt, eftirfarandi og ikki misvísandi.

Teir vísa á, at tá útlendingalógin varð broytt 1. juli í ár, viðførdi hetta, at arbeiðsgevarar, ið eru forhondsgóðkendir, sum tað eitur, kunnu taka fólk úr ES-londum heim og seta tey í starv í Føroyum beinanvegin.

- Tá hesi fólk eru komin til landið, skal forhondsgóðkendi arbeiðsgevarin senda inn eina umsókn (AR8-skjal) til Udlændingeservice í Danmark, har søkt verður um arbeiðs-og uppihaldsloyvi.

Carl og Jónas siga, at hetta í sær sjálvum skuldi verið ein stór broyting í mun til gomlu skipanina, har fleiri mánaðir kundu ganga, áðrenn viðurskiftini vóru greið, og tú kundi taka fólk heim at arbeiða.

- Fyri fólk, sum koma til Føroya at arbeiða á landi, er nýggja skipanin á einari leið. Tey kunnu koma higar og byrja at arbeiða beinanvegin, og eftir umleið 14 døgum fáa tey eitt fyribils p-tal, so tey kunnu fáa eina konto, hagar lønin kann flytast.

### Skyldir – men eingi rættindi

Men tað eru eisini vansar við hesi skipan, og teir eru ikki fáir og smáir.

- Soleingi, hesi fólk ikki hava eitt permanent p-tal, kunnu tey ikki flyta í eina føroyska kommunu, og tá tey ikki eru í føroyskari kommunu, kunnu tey heldur ikki fáa ein kommunulækna.

Carl og Jónas siga, at trupulleikin hjá útlendsku fiskimonnunum er uppaftur størri enn hjá fólki, sum komin eru at arbeiða uppi á landi.

- Fiskimenn kunnu ikki fáa minstuløn, soleingi teir ikki hava permanent p-tal og soleiðis heldur ikki bústað í nakrari kommunu. Aðrir trupulleikar, sum vit hava sæð hjá fiskimonnum við fyribils p-tali, er, at teir eru komnir í skeivan skattabólk, og onkur er enntá endaður í FAS, Føroysku Altjóða Skipaskránni.

Meðan onkur fiskimaður hevur goldið 15% í skatti tann fyrsta túrin, hevur ein annar við sama skipi goldið væl omanfyri 40%.

- Truplu umstøðurnar gera, at summir fiskimenn hótta við at fara heimaftur, og tað eru eisini teir, sum longu eru farnir.

Carl og Jónas siga, at soleiðis, sum umstøðurnar eftir broyttu útlendingalógini eru, kunnu hesir fiskimenn og fólk, sum komin eru til arbeiðis á landi annars, slett ikki liva á sama støði sosialt, sum føroyingar annars.

- Allir útlendsku fiskimenninir eru limir í Føroya Fiskimannafelag og tey, sum komin eru til Føroya at arbeiða í handverks-ella fiskivinnuni, eru limir í teimum fakfeløgum, sum umboða hendan partin av arbeiðsfólkinum.

Teir siga, at hóast hesi fólk longu frá fyrsta degi rinda limagjøld, skatt og gjøld til eitt nú ALS og barsil, fáa hesir borgarar ikki teir ágóðar, sum tey annars eiga í samfelagnum.

> *»Vit hava stórar ætlanir við okkara felag, og Føroyar skuldu ætlandi bert verða ein lutfalsliga lítil partur av okkara virksemi…«*
>
> *(Carl og Jónas)*